









# Nógvar nýggjar hárfríðkanarkvinnur

Mikudagin í síðstu viku megnaðu tíggju kvinnur at fáa sveinaroyndina innan hárfríðkan á Tekniska Skúla í Havn. Til seinastu royndina høvdu tær tíggju hárfríðkanarkvinnurnar sett sermerkt »gallahár« á alskyns hættir.



*Her sita allar hárfríðkanarkvinnurnar. Frá vinstru aftan: Rannvá Augustinussen, Karin Joensen, Erla Leonsson Poulsen, Angelie Poulsen, Heidi L. Nattestad, Linda Jensen, Una Olsen, Jórun McLeod Jacobsen, Bergtóra Joensen og Maria Katrin Lognberg. Prýðisligu kvinnurnar, sum sita fremst, eru modellirnar, sum hárfríðkunarkvinnurnar høvdu við sær til sveinaroyndina mikudagin.*

EIGUR TÚ EITT

SUMMARHÚS?

Vit sóknast eftir summarhúsum, ið vit kunnu leiga út til ferðandi í Føroyum í tíðarskeiðinum 1. juni til 1. september 2006.

Húsini, vit sóknast eftir, eru í høvuðsstaðarøkinum og í Streymoy sum heild. Her hugsa vit um Leynar, Stykkið, Kvívík, Vestmanna, Kollafjørð og norður til brúnna.

Um tú hevur eini summarhús, ið tú kundi hugsa tær at leiga út, ert tú vælkomin at ringja til okkara ella senda okkum ein t-post.



Green Gate Incoming
THE FAROE ISLANDS DESTINATION COMPANY

Undir Bryggjubakka 3
FO-100 Tórshavn
Tel +298 350 520
Fax +298 350 521
info@greengate.fo
www.greengate.fo

BURGER KING

Starvsfólk

TIL BURGER KING Í SMS

FULLA TÍÐ OG AFTANÁ SKÚLATÍÐ

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til fulltíðar arbeiði, og eftir fólki sum er 16 ár ella eldri til arbeiði aftaná skúlatíð. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

SEND UMSÓKNINA TIL

Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn. Ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.